## Parkin skal umbyggjast

Heimavøllurin hjá FCK og ognin hjá Flemming Østergaard, Parkin, skal um tvey ár umbyggjast. Ætlanin er at skilja leikvøllin í tvey við einum risa stórum veggi. Í veggin skal blasast luft, soleiðis at báðu megin verður ljóðtætt. Ætlanin við hesi umbygging er, at fleiri møguleikar skulu fáast. Eitt nú at hýsa øðrum ítróttar greinum, so sum tennis og hondbólti.



## Eriksson vil hava Yakubu

Longu fyrsta starvsdagin sum venjari í Manchester City, hevur Sven-Göran Eriksson sett sítt ynski fyri felagnum. Tað er nevniliga at fáa Middlesbrough-áleyparan Yakubu til felagið. Middlesbrough krevur 110 mió. kr. fyri farliga áleyparan, sum hevur skorað 61 mál í fýra kappingarár.

# Veðrið verður betri




*Sól, summar og strendur. Tað plagar at vera ímyndin av eini ferð suðureftir. Men sólin kann eisini blíva í meira lagi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað er ikki oftari enn so. Men í føroysku leguni frøddust fólk, tá veðurmenninir staðfestu, at hitin fer at fella á leið 10 stig komandi dagarnar**

OYGGJALEIKIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heima á brimbardu klettum okkara í Atlantshavinum er gott veður aloftast tað sama, sum tá lýkkan av álvara ger um seg.

Tað er tó ikki tað, sum liggur í luftini, tá omanfyristandandi yvirskrift verður skrivað. Fyrstu dagarnar, sum føroysk ítróttarfólk hava verið á Rhodos, hevur talan snøgt sagt verið um drepandi hita.

Føroyska ferðalagið heldur til á norðursíðuni á oynni, og har ger lotið úr ægeiska havinum, at hitastigini ikki verða heilt so nógv, sum aðrastaðni. Men stigini kortini sníkja seg upp um tey 40, er tað í meira lagi fyri ein norðbúgva. Og so kunnu fólk annars bara ímynda sær, hvussu standurin er á suðurpartinum á oynni. Har skulu eitt nú føroysku súkklararnir royna seg, og mikudagin var hitin her heili 47 stig, tá hann var mestur.

Tí eru tað kærkomin boð frá veðurfrøðingunum, tá hesir boða frá, at tað verður nakað svalligari komandi dagarnar. Fríggjadagin verður soleiðis sagt, termometrið fellur niður á eini 36-37 stig, og hóast tað eisini er ríkiligt, so er tað øllum førum meira liviligar umstøður at kappast í.

# Læknataskan bíðaði cyber-space

**Eitt brek í telduskipanini í Kastrup bar við sær, at á leið 7 føroysk kuffert hvurvu. Hósmorgunin komu flestu teirra tó aftur**

OYGGJALEIKIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er slíkt, sum kann henda, tá viðføristaskur hvørva á eini uttanlandsferð. Við neyvu skrásetingini, sum er standard á øllum flogvøllum ber tó aloftast til at finna fram til, hvar og við hvørjum flogfari kuffertið er farið.

Men tann loysnin var tó ikki tøk, tá komið varð eftir, at fleiri kuffert hjá føroysku luttakarunum ikki vóru komin fram til Rhodos.

Úr Kastrup vóru boðini nevniliga, at eitt brek á telduskipanini bar við sær, at ta einu løtuna var eingin sum helst skráseting av viðførinum. Og tí ber ikki til at síggja, hvar tær 1.500 strikukoturnar, sum ikki vóru komar í skipanina, vóru sendar.

### Medisintaskan burtur

Eitt er, at til ber at keypa sær neyðugu klædnapløggini til ferðina á staðnum. Og tí nýtist eitt mist kuffert ikki at spilla spælið.

Verri var, at heilivágstaskan hjá føroyska læknanum eisini var millum mista viðførið.

- Nú má eg arbeiða út frá tí, sum eg havi við mær í toilett-taskuni, so tað skal veruliga standa sína roynd, um eg dugi læknakynstrið, flenti Sølvi Winther Olsen, tá hann kom eftir, at taskan var horvin.

Innkeypsferðin á lokalu apotekini kundu tó strikast hósmorgunin. Tá komu boð til samskiparan hjá ÍSF, Ninnu Ørvarodd, at fleiri kuffert vóru komin. Hvaðani tey vóru komin, ella vhar hesi høvdu ferðast, fekk Ninna einki at vita um, men ivaleyst var lættin stórur hjá teimum, sum fingu viðførið aftur. Enn eru tó tvey kuffert, sum ikki eru funnin, men vónandi koma hesi tó onkran av døgunum.